# Námsskipan fyri masterútbúgvingina í søgu, 2024

**Fróðskaparsetur Føroya**

# Innihald


1 Inngangur ..... 5
2 Heitið á útbúgvingini á føroyskum og enskum ..... 5
3 Útbúgvingarstig ..... 5
4 ECTS-áseting ..... 5
5 Upptøkukrøv ..... 5
6 Endamál við útbúgvingini ..... 6
7 Lýsing av almennum og fakligum førleikum ..... 6
8 Útbúgvingarlæruúrtøkur ..... 7
9 Ásetingar um útbúgvingarviðurskifti: ..... 7
9.1 Bygnaðurin í útbúgvingini ..... 7
9.1.1 Raðfylgjan í útbúgvingini ..... 8
9.2 Innihald og ECTS í einstøku fakøkjunum ..... 8
9.2.1 Vísindaástøði og háttalag á master , 10 ECTS ..... 8
9.2.2 Føroyskt keldutilfar úr einavaldstíðini, 10 ECTS ..... 8
9.2.3 Masterverkætlan, 10 ECTS ..... 8
9.2.4 Valfrí skeið á masterstigi á Fróðskaparsetrinum og/ella útlendskum universiteti. 8
9.2.5 Praksislæra, 25 ECTS ..... 9
9.2.6 Fyrireiking til masterlæruritgerð, 5 ECTS ..... 9
9.2.7 Masterlæruritgerð, 30 ECTS ..... 9
9.3 Læru- og undirvísingarhættir í útbúgvingini ..... 9
9.4 Starvsvenjing ..... 9
9.5 Ritgerðir ..... 9
9.6 Metingarhættir ..... 9
9.7 Próvtøkur ..... 10
9.7.1 Almennar reglur um próvtøkur ..... 10
9.7.2 Raðfylgja av próvtøkum í lestrargongdini ..... 10
9.7.3 Innanhýsis ella uttanhýsis próvdøming ..... 10
9.7.4 Galdandi próvtalastigi; staðið/ikki staðið ..... 11
9.7.5 Endurpróvtøka og sjúkrapróvtøka ..... 11
9.7.6 Serlig atlit ..... 11
9.8 Undirvísingarmál ..... 11
9.9 Góðskriving ..... 11
9.10 Farloyvi ..... 12
9.11 Serlig atlit ..... 12
9.12 Altjóða útbúgvingarmøguleikar ..... 12
9.13 Luttøkuskylda ..... 12

9.14 Lestrarvirkni ..... 12
9.15 Eftirmeting av útbúgving og skeiðum ..... 12
9.16 Kærumøguleikar ..... 13
9.17 Vísindaligt rættlæti ..... 13
9.18 Nær lesandi í seinasta lagi skulu hava staðið endaligt prógv ..... 13
9.19 Treytir um broyting í námsskipan ..... 14
9.20 Aðrar ásetingar ..... 14
9.20.1 Útskriving ..... 14
9.20.2 Samskifti ..... 14
9.20.3 Lestrarárið ..... 14

## Fororð til tey lesandi frá Lestrarráðnum

Góðu lesandi

Ein námsskipan inniheldur grundreglurnar fyri tykkara lestur. Tí hevur tað alstóran týdning, at tit lesa og skilja hana. Saman við skeiðslýsingum og yvirskipaðum reglum hjá Setrinum, er námsskipanin eitt týðandi amboð, sum tit eiga at brúka. Á tann hátt kunnu tit kenna tykkara rættindi og tykkara skyldur.

Sambært viðtøkunum fyri Lestrarráð skal Lestrarráðið fáa uppskot til útbúgvingarprofilar og námsskipanir til viðgerðar og góðkenningar frá útbúgvingarleiðara, eftir at útbúgvingarleiðarin hevur fingið svar frá hoyringspørtum. Tá ið uppskot til námsskipan hevur verið viðgjørt, og vissa er fingin fyri, at viðkomandi partar eru hoyrdir, góðkennir lestrarráðið námsskipanina og letur dekaninum hana til víðari avgreiðslu.

Lestrarráðið hevur eftirlit við, at ymisku partarnir av útbúgvingini hanga saman, og at einstøk fak ella fakøki ikki broytast ov nógv í mun til endamálið við útbúgvingini. Ráðið skal eisini tryggja, at veitta undirvísingin og próvtøkukrøvini hóska til endamálið við útbúgvingini.

Henda námsskipanin er góðkend av Lestrarráðnum á Søgu- og samfelagsdeildini 19 mars 2024

Vegna Lestrarráðið

Tróndur Møller Sandoy, adjunktur á SSD

formaður

# 1 Inngangur

Í hesum skjali er námsskipanin fyri masterútbúgvingina í søgu lýst. Við heimild í Løgtingslóg nr. 58 frá 9 juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, og Kunngerð nr. 97 frá 17. juni 2021 ásetir námsskipanin innihaldið í útbúgvingini og reglurnar fyri, hvussu útbúgvingin verður útint. Útbúgvingin fylgir somuleiðis Bolognayvirlýsingini um eina felags evropeiska útbúgvingarskipan, og er skipað eftir hesum leisti. Námsskipanin inniheldur ikki skeiðslýsingar fyri tey einkultu fakini og heldur ikki almennar reglur hjá Setrinum. Hesar eru at finna á heimasíðu setursins.

Dekanurin hevur ta yvirskipaðu ábyrgdina av útbúgvingini, og útbúgvingarleiðarin hevur ta fakligu ábyrgdina.

Námsskipanin lýsir eisini krøvini til tann lesandi umframt rættindi og skyldur hjá tí lesandi.

# 2 Heitið á útbúgvingini á føroyskum og enskum

Masternámið gevur rætt til heitið *Master í søgu*, stytt *M.A. í søgu*.

Enska heitið er *Master of Arts in History*, abbreviated as *MA in History*.

# 3 Útbúgvingarstig

Master, "2nd Cycle" sambært QF-EHEA og stig 7 sambært EQF – LLL.

# 4 ECTS-áseting

Tann eittfakliga masterútbúgvingin við søgu sum alment nám er ein granskingargrundað fulltíðarútbúgving, sum er ásett til 120 ECTS.

1 ECTS svarar til 25-30 arbeiðstímar hjá tí lesandi. Eitt lestrarár við fulltíðarlestri er 60 ECTS svarandi til eina metta arbeiðsbyrðu á 1500-1800 tímar. Tá er allur lestraraktivitetur íroknaður.

Sí *ECTS Users' Guide 2015*[1] fyri nærri kunning um ECTS ásetingar.

# 5 Upptøkukrøv

Treytirnar fyri upptøku eru, at tann lesandi

- hevur staðið bachelorútbúgvingina í søgu frá Fróðskaparsetri Føroya

  ella

- hevur staðið aðra bachelorútbúgving frá har í minsta lagi 60 ECTS eru innan søguvísindi.

[1] European Comission (2017) *ECTS User's Guide* https://op.europa.eu/en/publication-detail/-/publication/da7467e6-8450-11e5-b8b7-01aa75ed71a1

Í øðrum førum, t.d. um ein umsøkjari hevur eina eittfakliga bachelorútbúgving innan náttúruvísindi ella hugvísindi, metir útbúgvingarleiðarin, um teir søguvísindaligu partarnir eru nøktandi.

Saman við umsóknini skulu umsøkjarar senda eitt skriv, har grundgivið verður fyri umsóknini.

Umsøkjari skal hava nøktandi útbúgving innan søguvísindalig háttaløg. Nøktandi útbúgving er vanliga 20 ECTS ella samsvarandi á bachelorstøði. Útbúgvingarleiðarin ger eina ítøkiliga meting av, um hesi krøv eru nøktað.

# 6 Endamál við útbúgvingini

Endamálið við masterútbúgvingini í søgu er, at lesandi menna víðkaðar førleikar innan tað søguliga fakøkið. Á útbúgvingini ognar tann lesandi sær eina holla vitan um søguvísindaliga fakøkið og serkunnleika um føroyska søgu í altjóða høpi.

Gjøgnum útbúgvingartilgongdina, sum fer fram í einum granskingarumhvørvi, mennir tann lesandi førleikar, sum eftir lokan útbúgving gera tann lesandi skikkaðan at taka sær av førleikakrevjandi uppgávum á arbeiðsmarknaðinum.. Harumframt hevur ein master fortreytir fyri gransking (ph.d.-útbúgving). Í mun til bachelor hevur ein við masterútbúgving útbygt sína fakligu vitan og sjálvstøði, soleiðis at hann sjálvstøðugt nýtir vísindalig ástøði og háttaløg bæði í akademiskum og yrkisligum høpi.

# 7 Lýsing av almennum og fakligum førleikum

| **Almennir førleikar** | |
|---|---|
| Akademiskt arbeiðslag | Dugir at arbeiða trupulleikarættað og dugir at viðgera og greina spurningar keldukritiskt við vísindingaligari tilgongd. . Dugir at skilja vísindaligt ástøði, háttaløg og arbeiðsgongdir, ið nýtt verða í søgu. |
| Persónligir eginleikar | Megnar sjálvstøðuga, kritiska støðutakan og leiðslu í søgu og í mun til egið valt fakøki. |
| Sjálvstøðugt arbeiðslag | Dugir at starvast sjálvstøðugt og at taka atlit til evnis-, tilfeingis- og tíðaravmarking. |
| Samskiftisførleikar | Dugir at samskifta skrivliga og munnliga í samsvari við samskiftisstøðuna. |
| **Fakligir førleikar** | |
| Yrkisgrundarlag | Dugir at vísa breiða og neyva vitan um týðandi tættir innan søgu og sítt ávísa fakøki, ið byggir á viðurkenda vísindaliga gransking og fakligheit. |
| Trupulleikaloysn | Dugir at átaka sær granskingarlíknandi og granskingargrundaðar uppgávur, og at arbeiða trupulleikarættað og tvørvísindaligt á einum høgum søgufakligum stigi. |
| Samskiftiseginleikar | Dugir at lýsa mál úr fleiri sjónarhornum, at greina hesi og føra fram týðandi vitan innan søgu. Megnar at kjakast við fakfelagar um hesi viðurskifti og við onnur, ið ikki eru serkøn í søgu. |
| Sjálvstøða | Evnar sjálvstøðugt at taka á seg uppgávur á høgum stigi, men samstundis hegni til at vera partur av einum arbeiðsbólki, umframt at leiða slíkar arbeiðsbólkar. |
| Leiðsla og menning | Megnar at taka á seg greinandi arbeiðsuppgávur vegna privatar, almennar og sjálvbodnar fyritøkur, stovnar og felagsskapir, og at bjóða fram væl grundað uppskot at greiða praktiskar avbjóðingar. |

# 8 Útbúgvingarlæruúrtøkur

Við lokna útbúgving skal tann lesandi vera før/ur fyri at:

- Meta um ástøðiligu og metodisku menningina innan søgu.
- Greina og meta um kjarnuhugtøk innan søgu.
- Kjakast um menning, ástøði og perspektiv innan søgu.
- Perspektivera søgufaklig hugtøk og ástøði, og greina støður og samanhangir í mun til søgu.
- Meta um, leiða og gjøgnumføra verkætlanir og menningararbeiði innan søgu.
- Meta um fakbókmentir og annað tilfar í mun til ein trupulleika ella tema.
- Velja út og meta um háttaløg innan fakøkið.
- Miðla ástøði, metodu, greining og úrslit á ein vísindaligan hátt.
- Greina viðkomandi ástøðiligar keldur.
- Lýsa og greina, hvussu úrvald háttaløg og arbeiðsgongdir kunnu brúkast at lýsa ein trupulleika.

# 9 Ásetingar um útbúgvingarviðurskifti:

## 9.1 Bygnaðurin í útbúgvingini

Útbúgvingin er skipað í skeiðum. Eitt skeið er samansett av eini fakeind ella einum bólki av fakeindum, sum hava sum endamál at geva tí lesandi eina heild av fakligum førleikum innan ein nærri ásetta tíðarkarm, sum er gjørdur uppí ECTS-stigum. Hesi verða endað við einum ella fleiri royndum innan fyri nærri ásettar próvtøkutíðir. Royndin er skilmarkað og avmarkað í námsskipanini.

Eittfakliga masterútbúgvingin í søgu er 120 ECTS og samansett av kravfakum upp á 90 ECTS og valfakum upp á 30 ECTS.

Útbúgvingin byggir upp á eina samanseting av fakligum, spurdómsstýrdum og tvørfakligum tilgongdum og verður løgd til rættis út frá hesum sløgum av arbeiði og eftirmeting, sum samskipa førleikar og fakliga grundan:

- Fyrilestrar
- Floksundirvísing
- Verkætlanararbeiði
- Verkstovur
- Uppgávuloysn (einsæris og í bólkum)
- Eftirmeting frá undirvísarum og lesandi
- Fakligari grundan
- Smærri uppgávur

### *9.1.1 Raðfylgjan í útbúgvingini*

| Lestrar-hálva | **MA í søgu, eittfakligt nám** | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Vísindaástøði og háttalag á master 10 ECTS | Føroyskt keldutilfar úr einavaldstíðini 10 ECTS | Masterverkætlan 10 ECTS |
| 2. | Valfrí skeið á masterstigi á Fróðskaparsetrinum og/ella útlendskum universiteti 30 ECTS | | |
| 3. | Praksislæra 25 ECTS | | Fyrireiking til masterritgerð 5 ECTS |
| 4. | Masterritgerð 30 ECTS | | |

| |
|---|
| Kravfak |
| Valfak |
| Starvsvenjing |

## 9.2 Innihald og ECTS í einstøku fakøkjunum

Fakliga innihaldið í útbúgvingini er nágreiniliga lýst í skeiðsskrá og skeiðslýsingunum, sum eru tøkar á heimsíðuni skeid.setur.fo. Skeiðslýsingar innihalda upplýsingar um: skeiðsnummar, heiti, ECTS námstig, fortreytir, stig, endamál við skeiðnum, innihald, læru- og undirvísingarhættir, læruúrtøka, próvtøkuháttur, próvdøming, próvtalsstigi, og ábyrgd.

Niðanfyri er innihaldið í útbúgvingini lýst við styttri faklýsingum.

### *9.2.1 Vísindaástøði og háttalag á master , 10 ECTS*

Endamálið við skeiðinum er, at tann lesandi ognar sær innlit í ymiskar vísindaástøðiligar fatanir, krøv til kanningarsnið og vitan um, hvussu ymisk háttalagsamboð kunnu nýtast í granskingarsamanhangi.

### *9.2.2 Føroyskt keldutilfar úr einavaldstíðini, 10 ECTS*

Endamálið við skeiðinum er, at tann lesandi mennir víðkaðar førleikar at kanna, viðgera og miðla keldutilfar um føroyska søgu í 18. og 19. øld.

### *9.2.3 Masterverkætlan, 10 ECTS*

Endamálið við masterverkætlanini er, at lesandi rannsaka eitt evni, sum hevur týdning fyri føroyska samfelagið (fortíð og/ella nútíð), við at nýta trupulleikagrundaða arbeiðstilgongd.

### *9.2.4 Valfrí skeið á masterstigi á Fróðskaparsetrinum og/ella útlendskum universiteti*

Í hesari lestrarhálvuni verða tey 30 ECTS stigini sett saman av teimum skeiðum á MA stigi, sum tann lesandi sjálvur hevur valt, og sum eru viðkomandi fyri hansara/hennara útbúgving, annaðhvørt í Føroyum ella uttanlands. Hendan lestrarhálvan gevur tí lesandi møguleika at ogna sær servitan, annaðhvørt á einum hægri lærustovni uttanlands ella á Fróðskaparsetri Føroya. Útboðið av valskeiðum á Setrinum kann vera skiftandi frá ári til ár.

Valfríu skeiðini eiga at vera viðkomandi fyri útbúgvingina og styrkja førleikarnar hjá tí lesandi. Fyri at tryggja, at tann lesandi á útbúgving síni mennir sínari akademisku førleikar stigvíst, skulu valskeiðini, sum tann lesandi hevur valt á næstu lestrarhálvuni, góðkennast av útbúgvingarleiðara áðrenn.

### 9.2.5 *Praksislæra, 25 ECTS*

Endamálið við praksislæruni er at víðka akademisku arbeiðsførleikarnar, hetta við at teoretisk vitan kemur í spæl við praksis umframt at skapa samanhang millum útbúgving og arbeiðsmarknað.

### 9.2.6 *Fyrireikandi skeið til masterritgerð, 5 ECTS*

Endamálið við skeiðnum er, at lesandi menna førleikan at brúka vísindaástøði, háttalag og kanningarsnið í mun til ein spurdóm, áðrenn tey skulu skriva høvuðsritgerð.

### 9.2.7 *Masterritgerð, 30 ECTS*

Endamálið við masterritgerðini er, at tann lesandi vísir víðkaðar refleksivar førleikar í problemorienteraðum og tvørvísindaligum arbeiðsháttaløgum.

## 9.3 Læru- og undirvísingarhættir í útbúgvingini

Undirvísingarhættirnir eru undirvísing við framløgum hjá undirvísarum og lesandi, skrivligar uppgávur, bólkarbeiði, venjingar og sjálvlestur.

Undirvísingin er skipað sum fyrilestrar, seminar, venjingar, bólkaarbeiði, heimauppgávur og verkætlanararbeiði, og hon er lýst í skeiðslýsingunum.

## 9.4 Starvsvenjing

Starvsvenjing er á tí eittfakligu útbúgvingini í søgu undir MA-lestrinum og er skipað sum praksislæra á 3. lestrarhálvu.

## 9.5 Ritgerðir

MA-lesturin endar við eini Masterritgerð, sum telur 30 ECTS. Hon verður gjørd í einum sjálvvaldum søguvísindaligum evni. Evnið skal góðkennast av vegleiðara ella útbúgvingarleiðara. Longdin á ritgerðini er:

- Ein lesandi: Í mesta lagi 31.500 orð
- Tvey lesandi: Í mesta lagi 40.500 orð
- Trý lesandi: Í mesta lagi 50.000 orð

Føroysk/norðurlendsk ritgerð skal hava enskt úrtak (abstract). Ensk ritgerð skal hava føroyskt/norðurlendskt úrtak. Próvtalið umfatar eisini úrtakið. Ritgerðin skal hava forsíðu við heiti á føroyskum og enskum, navni og lestrarnummari hjá lesandi, navni á útbúgving, deild og universiteti og ávísing av, hvussu mong orð eru og hvør tilvísingarleistur verður nýttur.

## 9.6 Metingarhættir

Tey lesandi fáa nærri vegleiðing um uppgávur og próvtøkur á hvørjum skeiði sær. Hetta er lýst í viðkomandi skeiðslýsing. Formativ meting verður nýtt sum læruháttur í undirvísingini, har tann lesandi fær afturboðan, meðan skeiðið er. Próvtøkur og próvtal er grundað á summativa meting av próvtøkuavrikinum hjá lesandi við skeiðslok.

## 9.7 Próvtøkur

### *9.7.1 Almennar reglur um próvtøkur*

Lesandi verður innskrivað/ur til allar próvtøkur, sum eru kravdur partur av útbúgvingini. Tá ein lesandi er innskrivað/ur til valskeið, verður hann innskrivaður til próvtøkuna á valskeiðnum.

Lesandi, sum hava verið í farloyvi, skulu sjálvi melda seg til fakini, tey skulu hava, á felags lestrarfyrisiting Fróðskaparsetursins, og tá verða tey sjálvvirkandi tilmeldað til tilhoyrandi próvtøkur.

Próvtøka er í hvørjari lærugrein sær, og hon verður skipað eftir einum av niðanfyristandandi próvtøkusløgum ella sum ein samanseting av hesum:

a) munnlig próvtøka
b) skrivlig próvtøka
c) skrivlig avrik (t.d. heimauppgávur, essay, ella synopsa), ið telja við í samlaða próvtalinum
d) munnlig próvtøka við støði í ritgerð
e) próvdøming av ritgerð

Próvtøkuhættirnir kunnu vera ein av hesum ella ein samanseting av hesum próvtøkuhættum.

Undir próvtøku verður støði tikið í læruúrtøkunum, sum eru lýstar í skeiðslýsingunum. Skeiðslýsingarnar finnast á heimasíðuni hjá Fróðskaparsetrinum.

### *9.7.2 Raðfylgja av próvtøkum í lestrargongdini*

**Talva 1 Raðfylgjan av próvtøkum**

| Lestrar-hálva | Skeið | Próvtøka | Endurpróv-tøka | Dømd | Stigi | ECTS |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Vísindaástøði og háttalag á master | Skrivlig einstaklingauppgáva | Sama | Innanhýsis | 7 | 10 |
| | Føroyskt keldutilfar úr einavaldstíðini | Skrivlig heimauppgáva | Sama | Innanhýsis | 7 | 10 |
| | Masterverkætlan | Verkætlanaruppgáva + munnlig | Sama | Innanhýsis | 7 | 10 |
| 2. | Valskeið | Sbrt. skeiðslýsing | Sama | Sama | 7 | 10 |
| | Valskeið | Sbrt. skeiðslýsing | Sama | Sama | 7 | 10 |
| | Valskeið | Sbrt. skeiðslýsing | Sama | Sama | 7 | 10 |
| 3. | Praksislæra | Frágr + munnlig | Sama | Uttanhýsis | 7 | 25 |
| | Fyrireireikandi skeið til masterritgerð | Skrivlig heimauppgáva | Sama | Innanhýsis | 7 | 5 |
| 4. | Masterritgerð | Ritgerð + munnlig við støði í ritgerð | Sama | Uttanhýsis | 7 | 30 |

### *9.7.3 Innanhýsis ella uttanhýsis próvdøming*

Próvdømingin kann vera við uttanhýsis ella innanhýsis próvdómara. Tá próvdømingin er uttanhýsis, verður avrikið dømt av undirvísaranum og próvdómara, sum ikki er í starvi á Fróðskaparsetrinum. Uttanhýsis próvdómarar skulu góðkennast av Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. Tá próvtøkan er innanhýsis, verður avrikið dømt av undirvísaranum

og einum vísindastarvsfólki á Fróðskaparsetrinum. Í minsta lagi 1/3 av próvtøkunum, roknað í ECTS-stigum, skulu próvdømast av uttanhýsis próvdómara. Hetta er undantikið starvsvenjing.

### *9.7.4 Galdandi próvtalastigi; staðið/ikki staðið*

Próvdømingin verður givin sum met eftir 7-talsstiganum ella sum "staðið/ikki staðið". Fyri at hava staðið fakið krevst metið 02.

Í mesta lagi 1/3 av próvtøkunum (roknað í ECTS-stigum) kunnu verða dømdar staðið/ikki staðið. Undantikið hesum er, tá ið talan er um starvsvenjing og avriksflutning.[2]

### *9.7.5 Endurpróvtøka og sjúkrapróvtøka*

Um tann lesandi gerst sjúk/ur og ikki kann fara til próvtøku, er møguligt at fara til sjúkapróvtøku. Fyri at fara til sjúkapróvtøku krevst læknaváttan, sum skal latast felags lestrarfyrisiting Fróðskaparsetursins í seinasta lagi eina viku eftir próvtøkudagin. Sjúkapróvtøka telur ikki við sum endurpróvtøka.

Lesandi, sum ikki hevur staðið eitt kravfak í útbúgvingini eftir tríggjar royndir, hevur ikki møguleika at gjøgnumføra útbúgvingina. Dekanurin kann geva loyvi til frávik frá hesi reglu eftir skrivligari umsókn, um serligar umstøður tala fyri tí.

Rætturin til endurpróvtøku er treytaður av, at møtt verður til regluligu próvtøkuna. Tá talan er um sjúku, er rætturin til endurpróvtøku treytaður av, at sjúkraváttanin er latin Setrinum rættstundis og á rætta stað. Skipað verður fyri endurpróvtøku seinast 3 mánaðir eftir regluligu próvtøkuna.

#### 9.7.5.1 Frámelding til próvtøku

Fyri at verða roknað/ur sum virkin lesandi, skal hin lesandi fara upp til próvtøku við fyrsta próvtøkuhøvið. Møguligt er at melda seg frá próvtøkuni, og skal hetta gerast í seinasta lagi 14 dagar eftir at skeiðið er byrjað. Lesandi, sum ikki melda seg frá próvtøku innan hesa freist og heldur ikki møta upp til próvtøku, verða skrásett sum "ikki møtt/ur", og telur hetta við í teimum trimum møguleikunum, tey hava at fara upp til próvtøku. Frámelding til próvtøku verður gjørd í telduposti, sum skal sendast til felags lestrarfyrisiting Fróðskaparsetursins.

### *9.7.6 Serlig atlit*

Um tann lesandi hevur skerdan virkisførleika, sálarliga ella kropsliga, verður tikið fyrilit fyri hesum innanfyri ásettu karmar í Kunngerð um útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya, sum broytt við kunngerð nr. 108 frá 25. juni 2021 § 12 stk 2.

## 9.8 Undirvísingarmál

Undirvísingarmálið og próvtøkumálið er føroyskt. Tó kann koma fyri, at undirvísarar nýta enskt ella skandinaviskt sum undirvísingarmál. Um próvtøkan verður skipað á øðrum máli enn føroyskum, skal hetta gerast í samráð við tann lesandi. Er talan um valfak, har undirvísingin er á skandinaviskum ella enskum máli, kann próvtøkan vera á sama máli sum undirvísingin.

## 9.9 Góðskriving

Um lesandi hevur staðið fak á øðrum universiteti, sum eru á sama ella hægri fakligum støði við sama fakliga innihaldi og/ella kunnu stuðla undir útbúgvingina sum heild, kunnu tey søkja um at fáa hesi fak góðskrivað, sum partar av útbúgvingini á Fróðskaparsetrinum.

---

[2] Heimilað í § 15, stk. 4, í Kunngerð nr. 99 frá 17. juni 2021 um próvtøkur á Fróðskaparsetri Føroya.

Mannagongdin fyri góðskriving er, at lesandi letur Lestrarskrivstovuni umsókn um góðskriving. Í umsóknini skal vera greitt, hvat skeið, sum er staðið, skal góðskriva annað skeið.

Útbúgvingarleiðarin letur fakundirvísara umsóknina um góðskriving til stutta viðmerking og at taka undir við. Tá hetta er gjørt, letur útbúgvingarleiðarin lestrarráðnum umsóknina saman við viðmerkingini hjá fakundirvísaranum. Lestrarráðið staðfestir síðani góðskrivingina.

Sí annars heimasíðu Fróðskaparseturs Føroya um mannagongdir í sambandi við avriksflutning og undangóðkenning.

## 9.10 Farloyvi

Søkjast kann um farloyvi umvegis felags lestrarfyrisiting Fróðskaparsetursins. Eru ivamál í sambandi við hetta, verður víst til lestrarvegleiðaran.

## 9.11 Serlig atlit

Setrið kann veita stuðul til lesandi, sum hava skerdan virkisførleika, sjúku ella um onnur serlig viðurskifti gera seg galdandi. Lesandi, sum meta seg hava tørv á hjálp at fylgja og gjøgnumføra útbúgvingina, skulu venda sær til lestrarvegleiðingina um nærri kunning.

## 9.12 Altjóða útbúgvingarmøguleikar

Møguligt er at taka partar av útbúgvingini á øðrum universiteti sum skiftislesandi, tó í mesta lagi 60 ECTS. Áðrenn farið verður uttanlands at lesa, er neyðugt at søkja lestrarráðið um undangóðkenning av skeiðunum, sí vegleiðing Fróðskaparseturins um Avriksflutning og undangóðkenning.

Lestrarvegleiðarin og Altjóða skrivstovan vegleiða um viðurskifti og møguleikar í sambandi við skiftislestur.

## 9.13 Luttøkuskylda

Aktiv luttøka er fortreyt fyri at tryggja góðskuna í undirvísingini og læring hjá tí lesandi. Krøv um luttøku eru nærri lýst í skeiðslýsingunum.

## 9.14 Lestrarvirkni

Væntað verður, at lesandi møtir regluliga til undirvísing. Harumframt verður væntað, at lesandi er fyrireikað/ur til undirvísing, luttekur í kjaki og framløgum, umframt at lesandi tekur ábyrgd fyri egnari læring.

Lestrarskrivstovan ásetur nærri reglur um treytir fyri lestrarvirkni

Lesandi við skerdum virkisførleika kunnu fáa tillagaðar treytir um lestrarvirkni.

## 9.15 Eftirmeting av útbúgving og skeiðum

Skeið verða eftirmett kvantitativt og einsæris eftir einum felags leisti galdandi fyri øll skeið á Setrinum. Ein felags munnlig eftirmeting er árliga, sum Lestrarráðið stendur fyri, har umboð fyri allar útbúgvingar og árgangir luttaka.

Tað er umráðandi, at tann lesandi luttekur í eftirmetingunum, og at úrslitini frá eftirmetingunum verða nýtt til at gera áhaldandi tillagingar á útbúgvingunum. Tískil er tað ein ábyrgd hjá tí lesandi at útvega vitan um, hvussu hon/hann upplivir at vera lesandi á útbúgvingini umframt, hvussu hon/hann hevur upplivað einstøku skeiðini.

## 9.16 Kærumøguleikar

Kærur um próvtøkur, próvtøkuhættir, próvdøming, próvskjal ella aðra døming, sum er partur av próvtøkuni, verða stílaðar til dekanin og latnar skrivstovuni á Søgu - og samfelagsdeildini. Kæran skal vera skrivlig og grundgivin og vera latin inn í seinasta lagi 4 vikur eftir at dømingin er kunngjørd fyri lesandi.

Heimild og kæruvegleiðing eru at finna í Løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012, kapittul 6a, og Kunngerð nr. 99 um próvtøkur á Fróðskaparsetri Føroya frá 17. juni 2021. Sí eisini um Kærumøguleikar á heimasíðu Fróðskaparsetursins.

## 9.17 Vísindaligt rættlæti

Ritstuldur og svik verður ikki góðtikið. Tá uppgávur verða skrivaðar og latnar inn til próvdøming, verður tað tikið sum ein sjálvfylgja, at tilvísingar eru til allar heimildir, sum verða brúktar í uppgávuni. Tekstur og hugsanir hjá øðrum eiga at hava greiðar tilvísingar eftir vanligari akademiskari siðvenju.

Verður stuldur og svik avdúkað í skrivligum uppgávum, bæði próvtøkuuppgávum og øðrum innlatingum, fær hetta avleiðingar, og í ringasta føri kann ein verða burturvístur av Fróðskaparsetrinum. Tað er óreiðiligt at lata vera við at upplýsa ella at dylja á slíkan hátt, at villleiðing stendst av avriki hjá lesandi. Til dømis metist tað sum at dylja ikki at upplýsa allar heimildir til ritgerð. Avskrift og eftirgerð av tekstum hjá øðrum er falsan, um ikki greitt verður tilskilað, hvat er endurgeving, og hvat er endursøgn av teksti hjá øðrum, og hvaðani hugmyndir, sum ikki eru almennar og hin lesandi ikki eigur, eru fingnar.

Dømi, sum heilt greitt eru svik, er at lata uppgávu inn, sum lesandi ikki sjálvur hevur skrivað, ella at lata somu uppgávu inn til fleiri próvtøkur. At endurnýta partar av uppgávu er somuleiðis svik. Allar skrivligar uppgávur verða kannaðar fyri ritstuldur við URKUND-skipanini.

Verður ritstuldur staðfestur, uttan mun til, um hetta er tilvitað ella ikki, tekur dekanurin støðu í málinum.

## 9.18 Nær lesandi í seinasta lagi skulu hava staðið endaligt prógv

Útbúgvingin er ásett til 2 ár.

Lesandi, sum eru innskrivað til útbúgving á Fróðskaparsetri Føroya áðrenn 1. august 2021, kunnu gera seg liðug eftir kunngerð nr. 85 frá 9. juni 2009, gomlum lesiætlanum og námsskipanum. Lestur eftir tí gomlu kunngerðini skal í seinasta lagi vera lokin innan lestrarársbyrjan 2026.[3]

[3] Heimilað í Kunngerð nr. 97 um útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya, sum broytt við kunngerð nr. 108 frá 25. juni 2021, § 19, stk. 4.

## 9.19 Treytir um broyting í námsskipan

Útbúgvingarleiðarin kann gera uppskot til broytingar í námsskipanini, og hesar skulu viðmerkjast av lestrarráðnum. Lestrarráðið kann eisini heita á útbúgvingarleiðaran og viðmæla broytingar í námsskipanini. Møguligar broytingar koma í gildi við lestrarársbyrjan.

Sí kapittul 3 í kunngerð um útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya, sum broytt við kunngerð nr. 108 frá 25. juni 2021 um viðtøku og broyting í námsskipanum annars.

## 9.20 Aðrar ásetingar

### *9.20.1 Útskriving*

Velur lesandi at útskriva seg frá lestrinum, verður hetta gjørt við at venda sær til felags lestrarfyrisiting Fróðskaparsetursins og við at útfylla oyðublað til hetta endamál. Um lesandi ynskir at byrja lesturin aftur, skal hon/hann søkja inn av nýggjum á jøvnum føti við onnur lesandi.

### *9.20.2 Samskifti*

Samskifti við tey lesandi skal so vítt møguligt fara fram á kunningartøknipallum Fróðskaparseturins (t.d. t-post, heimasíðu, Moodle, o.t.).

### *9.20.3 Lestrarárið*

Lestrarárið byrjar í viku 34 og endar í viku 25. Eingin undirvísing, sum er kravd í sambandi við útbúgvingina, fer fram uttanfyri hetta tíðarskeiðið. Tó er vanligt, at summarskeið, seminar og verkstovur liggja uttanfyri formliga lestrarárið.